**Uppgávuslag 4.**

Fyrisøgnin verður fyrst lisin fyri næmingunum.
So verður fyrisagt tvær ferðir passaliga fá orð í senn.

2

## Gráhærdur eftir einum tíma

Ein ungur maður fór ein morgun í brúdleyp hjá einum vinmanni, sum búði í grannabygdini, og fyri at stytta eitt sindur um leiðina fór hann gjøgnum eitt berghol, sum var har í nánd.

Tá ið hann hevði gingið eina løtu í tí hálvmyrka holinum, hoyrdi hann larmin frá einum stórum bussi, sum kom ímóti honum. Hann visti, at nú var vandi á ferð, tí holið var so trongt, at bussurin slapp ikki framvið, uttan at hann kroystist. Hann vendi tí við og fór stórleypandi undan, og í síðstu løtu eydnaðist at sleppa út úr holinum, tí tá var bussurin dygst í hølunum á honum.

Tann neyðar maður var so hjartkiptur, tá ið hann kom útum, at hann tveitti seg fram eftir rommum og orkaði ikki at fara aftur á føtur, fyrr enn hann hevði hvílt seg í meir enn ein tíma.

Tá ið hann umsíðir kom til brúdleypshúsið, kendu gestirnir hann næstan ikki. Andlit hansara var gult á liti, og hann skalv um allan kroppin, og tað vakra, dimma hárið var gránað eftir einum tíma.

Brúdleypsgestirnir vóru allir samdir um, at tann ræðuliga ræðslan var orsøkin til, at hesin ungi maðurin gránaði eftir einum tíma.

maður

morgun

at stytta

gjøgnum

brúdleyp

hevði gingið

í nánd

framvið

síðstu

á ferð

hvílt

dygst

hárið var gránað

næstan

hjartkiptur

gult á liti

ræðslan